# Dana mál á manna munni - mammumálið og sprokpleyga

EYÐUN Á BORG
málrøktingarmaður



**Máldálking – brøðralag sambandskra sosialdemokrata/ sosialista!?**

Ein málbók kom út stutt fyri ólavsøku. Bókin eitur: Føroya mál á manna munni – móðurmálið og málrøkt. André Niclasen hevur skrivað. Í bókini eru málgreinir, ið stóðu í málteigi (máldálkingarteigi) í Sosialinum á sinni. Tað er bara so langt síðani, einaferð í farna túsundári, farnu øld, so tíðin er helst farin frá slíkari bók!?

**Innbjóðingarkort:** Undirritaði fekk persónliga innbjóðing til bókarframløguna. Tað takki eg fyri. Tíverri lá ikki fyri hjá mær at koma.

Rithøvundurin møtti ikki sjálvur upp til framløguna. Tað helt eg vera eitt sindur løgið!?

Á innbjóðingarkortinum stóð orðið, bókaframløga. Bóka er hvørsfall fleirtal. Sjálvt um fleiri eintøk eru av bókini, so er her talan um eina bók, sum verður útgivin. Tí hevði tað verið rættari at skrivað bókarframløga (hvørsfall eintal). Tit skuldu kanska heldur skrivað framleggilsi, framløga ljóðar so íslendskt!?

Bókin kundi fáast til serprís. Hatta er danskt. Á føroyskum fært tú okkurt fyri ein ávísan prís, ikki til! Ikki er hatta nóg gott hjá fólki, sum fæst við "málrøkt"!

Tað er helst ófólkaligt at rætta brøv, sum tú fært, men í slíkum føri er tað kanska í lagi!?

**Bókin:** Handan bókin roynir at verja danska ávirkan á føroyskt mál. Vorðið sum málstrev! Tey ungu siga mær, at rithøvundurin var sera góður lærari. Spell, at so gávuríkur maður skal leggja so stóra orku í at speireka málrøktina og tey, sum royna at fjálga um móðurmálið.

Rithøvundurin er eitt sindur skemtiligur í skriving síni. Í onkrum eintøkum føri hevur hann kanska grein í sínum máli, treyðugt so; men høvuðsboðskapurin í bókini er at speireka og lítilsvirða tey, sum hava vart borg móti tí øgiligu, donsku málávirkanini.

Annars er bókin eitt sindur fúl í støðum. Vónandi kemur hon ikki inn um skúlagátt, men um hon skuldi gjørt tað, so má aldursmark setast á!

Tað er eisini ótrúligt, at ein málmaður kann hava slíkan hugburð, tá hugsað verður um skyldskapin millum føroyskt / íslendskt og so danskt.

**Villur í bókini:** Bókin er heldur ikki lýtaleys. Við at blaða skjótt gjøgnum hana eri eg komin fram á onkra málsliga villu, nakrar stavivillur og so sjálvandi allar danismurnar!

Málsligar villur: betri (skal vera betur), longur (longri), sjálvi (sjálv), vrakaði (vrakað), innaftur (inn aftur), tey sparka seg sjálvan (sjálv), loytnant Kruse (Kruse loytnantur).

Stavivillur: grikst (skal vera grikskt), skýra (skíra).

Danismur: óundveriligt, skrekkur, heldigur, hjúl, tretivu. (Meir seinni!)

Er bókin ikki rættlisin?

Hetta er átaluvert, ikki minst , nú talan er um eina málbók og eitt forlag, sum kallar seg Læribókafelagið! Eg meini tað!

**Sosialistar?:** Málfrøðingur segði, at okkum dámar væl at bólka fólk. Tað fari eg at royna at gera nú!

Hvørjir eru so garparnir, ið taka undir við hesi óføroysku, danofilu málkósini (sprokpleygualliansuni)? Jú, ein felagsnevnari er! Teir tykjast vera sambandskir sosialdemokratar (sosialistar)!? Nú má eg draga í land aftur beinanvegin. Vit tosa ikki um Sambandsflokkin. Um Javnaðarflokkin? Ja, kanska í ein vissan mun; men tað er sjálvandi stór fjøld av málrøktarvinum millum sosialdemokratar. Meir vinstrahallir? Ja, eg veit ikki rættiliga, men onkur felagsnevnari tykist vera har.

Orsakið meg, vinstrahallu móðurmálsvinir! Tit eru sjálvandi ikki við á máldálkingarliðnum.

Tað eru máldálkararnir sjálvir, ið elva til hesa bólkingina. Teir skjóta eftir tjóðskaparfólki og fullveldisfólki í hesum málstríði. Marx varð eisini nevndur í teirra blaðskriving.

**Persónarnir:** At blaðteknari Sosialsins, onkur einstakur málfrøðingur, onkur á flatlondum og einstøk onnur taka undir við hasi bókini, tað ber til at skilja; men hvat ger navni blaðteknarans í hasum brøðralagnum, hann, sum skrivar fororðini?

Sum smyril í staraflokki, ella sum spurvur í tranadansi, sum hinir kanska høvdu sagt.

If you can´t beat them, join them!? Hvat hendi annars um 1990? Ja, verðin er so undarlig, góðin, so segði hann, sandoyingurin.

Annar fólkafloksmaður var eisini sæddur í Miðlahúsinum framløgudagin. Hvat hevði Bóndin sagt?

Helt annars, at sosialistar vóru menn, ið stríddust móti imperialismuni. Hesir leggja seg skerflatar fyri útlendskum / donskum árini.

E.S. : Dugir onkur máldálkari at siga mær, um pleyga hevur g?

Nei, handan bókin fær ikki nógvar stjørnur, Rólvur!

Við føroyskari málkvøðu (ikki danskføroyskari)

# Serskøltur

TÓRIR MIKKELSEN
Føroyar anno 2007

**[fólk við serstøkum hugsanarhátti (og atburði), serlynt fólk, serknokkur, serlingur]**

Lærarin tivaði av øði, hugdi á klassan.

- Jú fanin mugu tit vita hvør J.H.O Djurhuus var, ýldi hann, hann var størsta skald í Føroya søgu! Tit ganga nú á triðja árið á student og ikki vita tit hvør Janus var. Tað var tað sama hvørt ár, 3-4 næmingar, ið fylgdu við og høvdu neyðuga áhugan og IK, restin var eitt bland av leti, ella mangul uppá intelligens. Hesi seinnu sótu og prátaðu sína millum, ella gjørdi eitt hvørt við fartelduni, ipod´in ella hvat tramin tað nú æt. Bulmikli lærarin, við stóra skegginum bað ein næming lesa yrkingina Føroyar mítt land upp og droymdi seg burtur í annan heim.

Kjartan hugdi um seg, føroyskt hevði ongantíð verið serliga áhugavert og hesin tímin var einki undantak.

Flokkurin var samansettur av næmingum úr Norðoyggjum, Eysturoy og Norðurstreymoy, eitt satt miks av ymsum lagnum. Klaksvíkingarnir vóru allir sum ein fongdir við trúðarsjúkuni, hendan sjúkan hevði spreitt seg til mesta av landinum. Sjúkueyðkennini vóru løtt at kenna aftur: Flatan humor, allir høvdu eitt satt arsenal av bíbliu sitatum, ið fuku runt, hvørja ferð kjakast var um, eitt nú 256b , fosturtøku ella hini vanligu etisku kjakini. Klaksvíkingar høvdu allar teir eginleikar, ið ikki áttu at verið loyvdir á hesum skúlanum. Úrslitið var eyðsæð, Miðflokkurin og Keldan, ið nú misprýddi mentanarsøgu landsins.

Kjartan kundi ikki lata vera við at smílast innantanna, hetta var rættuliga ein ímynd av Føroyum. Ein skúli bygdur av helviti til, úti á eini oyðimørk, bert tí at kommunurnar av berum treiskni ikki kundu semjast um, hvar hann skuldi byggjast. Hetta og so tað, at skúlin bleiv bygdur undir kreppuni bar við sær, at tað kendist sum um at vera fangaður á Alkatraz, no way out.

Leirvíkingar vóru eitt heilt annað fólk, skemtingarsamt og rættuliga skilagott. Við beiggjunum Rasmus og Djalli á odda skaptu teir ein herligan dynamik, ið gjørdi at flokkurin 3.E fekk lærarar at óttast tímarnar.

Kjartan var eingin "mønster elev" sum tað so fínt eitur á donskum, tey flestu høvdu hómað ein færra av "potientiale", ið fólkaskúlin so væl høvdu pilkað úr honum. Hann hugsaði um komandi val, har allir teir feitu lærararnir, læknar og løgreglufólk stríddust fyri at sita 4 ár aftrat. Teir vóru júst sum hesir grísarnir á donskum bóndagørðum, áðrenn slaktið. Samlaða miðalvektin á løgtinginum var allarhelst vaksin eini 10 kg og hesir "grísarnir" vónaðu at fáa 4 ár aftrat. Tað fór allarhelst at eydnast. Tey næstu 4 árini kundu teir so meska seg, liva upp á tóm vallyftir og kanska ein tápuligan undirsjóvartunnil til sands.

Kjartan var fanin óður, her hevði hann gingið í 3 ár, og longu í september fekk hann fyrstu ávaring fyri fráveru. Hetta var skipanin, ið syrgdi fyri, at næmingar møttu upp til tímarnar. Um tú bleivst skrivaður fyri fráveru, ja so skuldi ein inn og práta við hasum høgravenda einaræðisharranum; á gud hvat hann hataði hatta Hitler skeggið. Hendan skitna skúlaskipanin, ið stuðlaðu lærararnar, so teir kundu sita í embætinum á lívstíð, maniodeppresivir og útbrendir.

# Munnkurv?

MALAN EGHOLM

Sá á portalinum 31.august 07, at eitt flogfar hjá Atlantic Airways var farið út í neyðsporið vegna ólag í bremsuskipanini. Tíbetur ongin mannskaði. Vildi onki nevna fyri soninum, sum skuldi til Føroyar dagin eftir, tí hann kann ikki tola at flúgva. Bíðaði eftir sjónvarpstíðindunum um kvøldið, um nærri frágreiðing um hendingina. Og tað undraði meg ikki so lítið, at har bert kom eitt mini-innslag um hendingina. Akkurát sum nå, men forrestin so....

Meini so við, at um nú flogfarið var farið í luftina við brekinum, so hevði tað helst ikki spælt so væl av, tá til stykkis kom. "Ja, hvis hvis, min røv var spids.." sum danir taka til, gitingar kann man ikki brúka til nakað. Men fakta var, at bremsiskipanin var í ólagi. Og hvussu ber tað so til, at tað ikki var avdúkað, áðrenn flogfarið fór út á breytina? Einfaldur spurningur. Tað rokni eg við, at onnur enn eg spyrja um. Eg flúgvi ofta við Atlantic Airways, og fyri meg er tað umráðandi at vita, at flogfelagið hevur greiðar trygdarleiðreglur, og at hesar vera fylgdar.

Hóast man hevur greiðar leiðreglur, so er tað er ein sannroynd, at feilir koma fyri. Innan heilsuverkið t. d. í Danmark, hevur man skyldu at rapportera frá "hændelsesforløb ved næsten ulykker", hvat hendi og hví, hvørji fólk vóru involveraði, hvussu reageraði man o.s.fr. og hvat skal gerast fyri at byrgja upp fyri at feilurin ikki endurtekur seg. Tað eru atkomiligir upplýsingar til øll. Og tað var nakað líknandi, eg hevði væntað mær at frætta um í fjølmiðlunum, eina frágreiðing. Tað gjørdi eg ikki.

Og so fer myllan í sving. Man hatta vera eitt av teimum flogførunum, sum hevur havt trupulleikar við flapsunum?? Bara fyri at nevna ein av spurningunum.

Haldi tað er sera løgið, at fjølmiðlarnir eru so tigandi.

Hevur nakar fingið munnkurv?